**Vegleiðing um leikbann**

Í sambandi við sekt av útvístum leikarum, burturvístum venjarum/leiðarum, og sekt fyri at vísa óhøviskan atburð í orð og talu í sambandi við dyst, venjingardyst ella venjing.

**Innleiðing**

Vísandi til í § 37 í kappingarreglunum fyri fótbólt, hevur Kappingarnevndin gjørt hesa vegleiðing.

Avgerðir tiknar eftir hesi vegleiðing, sum geva leikbann í meiri enn 2 dagar, kunnu leggjast fyri Aga- og etiskunevndina.

Um leikari fremur brot, ið førir við sær útvísing, og hetta brot er orsakað erting (provokasjón) frá mótleikara, skal Aðalskrivstovan meta um, hvørt brotið skal sektast linari, enn brotið annars vildi verið sektað.

**1. ÁTALA**

Verður ógvuliga sjáldan givin.

**2. LEIKBANN 1 DYST**

Verður vanliga givið fyri brot, ið er fevnt av fótbóltslógini § 12, og sum ikki koma undir pkt. 3, 4 og 5 í hesi vegleiðing.

Leikbann 1 dyst verður vanliga givið fyri m.a. hesi brot:

– Brúka munn ímóti dómara

– Brúka ljótan munn ímóti mótleikara, áskoðara ella øðrum

– Endurtiknum brotum av leikreglunum (Verður givið leikara, sum frammanundan hevur fingið gult kort, og sum seinni ger seg sekan í brotið, sum viðførir seinna gula kortið).

– At fella, halda ella á annan hátt steðga mótleikara í møguligum málmøguleika, ella á veg til slíkan, uttan sjálvur at hava møguleika fyri at fáa bóltin.

– Við vilja at steðga bóltinum við hondini, fyri at steðga mótleikara í møguligum málmøguleika, ella á veg til slíkan.

– Fyri roynd at sparka ella sláa í sambandi við stríð um bóltin.

– Fyri at fella mótstøðuleikara aftanífrá.

**3. LEIKBANN 2 DYSTIR**

Verður vanliga givið fyri eitt sindur grovari brot, sum m.a.

– at sparka ella sláa í sambandi við stríð um bóltin

– fyri roynd at sparka ella sláa um bólturin ikki er í spæli, ella um spælið fyrigongur aðrastaðni á vøllinum

– Brúka sera ljótan munn ímóti mótleikara, áskoðara ella øðrum. – Fyri at nýta ljótan munn ímóti dómara (ljót orð, ljótan atburð, vísa fingurin o.l.)

– fyri at spýta

– fyri harðligan atburð mótvegis við- ella mótstøðuleikara.

**4. LEIKBANN 3 DYSTIR**

Verður givið fyri grov brot sum m.a.:

– at sparka ella sláa, um bólturin ikki er í spælið, ella um spælið fer fram aðrastaðni á vøllinum.

– Verður givið fyri grov ella sera grov brot móti leikara, dómara ella øðrum. Herundir háðandi ella niðurgerandi málburð og ella tekin. Víst verður til FIFA disciplinary code

Um talan er um serliga grov brot, so verður víst til prunkt 5 í hesi vegleiðing.

**5. LEIKBANN 4 – 6 DYSTIR**

– Verður givið fyri serliga grov brot móti leikara, dómara ella øðrum. Víst verður til FIFA disciplinary code

**6. LEIKBANN FLEIRI  ENN 6 DYSTIR**

– Verður givið fyri serliga grov brot móti leikara, dómara ella øðrum. Víst verður til FIFA disciplinary code

– Fyri rasistiskan atburð/útsøgn, í minsta lagi 10 dystir ella eitt avíst tíðarskeið.

**7. VENJINGARDYSTIR V.M.**

Feløgini hava fulla áyrgd av fyriskipan og døming av venjingardystum.

Brot, sum seta fótbóltin í ringt ljós, verða sektað við bót og møguligum leikbanni til leikarar og/ella burturvísing til leiðarar, venjarar o.o.

**8. LEIKBANNAÐIR LEIKARAR**

Leikari, sum er útvístur skal beinanvegin fara út um girðingina, og kann ikki koma inn aftur á vøllin, fyrr enn dystur er endaliga lokin. Sama er galdandi fyri leikbannaðar leikarar.

Er talan um leikara, sum eisini er venjari ella leiðari, verður víst til punkt 9 í hesi vegleiðing.

Í serligum førum kann leikbann verða longt, um hesar reglur ikki verða hildnar.

### 9. BURTURVÍSTIR VENJARAR/LEIÐARAR

Venjarar/leiðarar sum hava/fáa leikbann/burturvísing, skulu beinanvegin fara av vøllinum, og kunnu tískil heldur ikki leiða liðið restina av dystinum.

Burturvístur venjari, leiðari ella hjálparfólk kann, meðan viðkomandi er burturvíst/ur, uppihalda seg á ovasta rað í áskoðaraskýlinum/plássinum, meðan dystur verður leiktur og til dysturin er endaliga lokin.

Venjari/leiðari, ið er burturvístur (fær leikbann), kann ikki leika, verða á tekniska økinum ella leiða liðið frá øðrum øki, so leingi leikbannið er galdandi.

Burturvístur venjari/leiðari kann heldur ikki uppihalda seg saman við liðnum í tíðarskeiðnum frá 1½ tíma (90 minuttir) undan dystinum, og til liðini eru farin av aftur vøllinum eftir loknan dyst, so leingi leikbannið/burturvísingin er galdandi.

Sektin fyri leikbann/burturvísing av venjara/leiðara í Meistaradeildini, 1. deild og 2. deild hjá monnum og í Meistaradeildini hjá kvinnum, er vanliga leikbann/burturvísing í 1 dyst ella fleiri. Í lægri deildum kann bót gevast ístaðin fyri leikbann/burturvísing.

Um treytirnar fyri burturvísing ikki verða hildnar, kann burturvísingin verða longd.

### 10. ÚTVÍSING/BURTURVÍSING Í KAPPING ELLA DYSTI UTTAN FYRI FØROYAR

– Við útvísing/burturvísing í kapping ella privatdysti uttan fyri Føroyar, kann Aðalumsitingin í hvørjum einstøkum føri taka upp og gera av, um hetta er eitt mál, sum eigur at verða tikið til viðgerðar, við atliti til hvat slag og hvussu grovt brotið er.

### 11. ÓHØVISKUR ATBURÐUR/MÁLBURÐUR Í SAMBANDI VIÐ DYST OG VENJING

– Leikarar, venjarar, leiðarar ella onnur, sum í sambandi við dyst ella venjing, vísa óhøviskan atburð mótvegis leikarum, leiðarum, venjarum, dómarum, áskoðarum ella øðrum, skulu vanliga hava leikbann 1-3 dystir, um tað ikki er grundarlag fyri enn longri banni.

– Leikarar ella aðrir álitispersónar í felagnum, sum alment sáa iva um gegni dómarans ella dómarabólksins, mótstøðuliðið ella onnur í sambandi við dyst ella venjing, verða revsaði við leikbannið ella burturvísing minst 3 dystir. Um talan er um serliga grovt brot, kann talan gerast um enn longri leikbann ella burturvísing.

– Um talan er um annan álitispersón enn leikara og/ella venjara, verður málið lagt til Aga- og etiskunevndina til avgerðar.

– Felag kann eisini fáa revsing um áskoðarar tess vísa óhøviskan atburð.

– Um leiðari ger seg skyldugan í óhøviskum atburði, kann felagið verða sekta við bót.

**12. Gildiskoma**

Soleiðis samtykt av Starvnevndini 24.02.2025, at koma í gildi beinanvegin.